# Shu-Bi-Dua duga

## Ein sonn fólkslig løta var tað, tá Shubidua fór á pall á Vágsbø fríggjakvøldið



Dagfinn Olsen

Har komu øll hittini síðani fyrst í sjeytiárunum og til dagin í dag. Tónleikurin riggaði væl, svingaði og pallframførslan var sum hon skuldi vera .

Væl kryddrað við humøri allan vegin, og ikki minst rock'n roll. Tað riggaði og swingaði. Lagt var út beinanvegin við vælsvingandi rocktónum og so komu løg sum Vuffelivov, Minus til Plus og Folkevogn. Guitar og urga vóru í hásæti, meðan rockmaskinan koyrdi við fullari ferð. Steðgað varð ikki á millum løgini og tað so at siga koyrdi bara.

### Keks

Stundin var so komin til sangin Hvalborg. Ferðin bleiv tikin eitt sindur av framførsluni og ljóðið var so gott sum sjáldan. Og sjálvsagt var løtan so komin til at kasta keks upp á pallin, sum síðan er, tá hesin sangur verður spældur.

Og so setti Bundesen tíð av til beinleiðis samband við fólkið. Saman var sungið "halelujah", meðan armar og hendir veitraðu til høgru og vinstru. Ja, fólksligt og hugaligt, at stúgvandi fullur Vágsbøur samdur lat Shubidua leiða seg hesa tónleikaligu hugnaløtu.

Bert tveir eru eftir av upprunamanningini, men hinir eru eisini dygdargóðir tónleikarar, og bólkurin er tí sera góður á palli. Tað kom eisini fram, tá guitarleikarin og ljómborðleikarin fóru í ein tónleikadyst, eina duel, har teir fingu víst sínar dygdir.

### Dámur á pall

Og Bundesen smæddist ikki við at bjóða vøkrum føroyskum konufólkum á pallin. Og so kom sangurin um Kære Lone. Harnæst McArine og so Den Røde Trad, har fjøldin slapp at byrja.



Samspalið við fjøldina var ein sonn fragd alla tíðina.

Full ferð kom aftur á við Stærk Tobak, og guitarrockurin rullaði aftur.

Tá stílfulla og trygga framførslan hjá Bundesen & Co. var av, kravdust eykanummur, og endað var við Sexchikane, har lagið jú er av afrikanskum uppruna, og tískil swingaði eyka væl.

Frásøgumaðurin Sjúrður Skaale tók kenda tjóðskaparhugaða figurin hjá sær fram og staðfesti, at hetta var ússaligt danskt pjatt, men máti sanna, at hetta var ikki so galið viðhvørt.

Shu-Bi-Dua fingu Vágsbø at svinga og synja við. Hetta ar undirhald, væl spældur tónleikur, og hugni. Teir duga!!! Shubidua duga!

# Festligi Robert

## Robert McBirnie hevði eina undirhaldandi og stuttliga framførslu á Føroya tele pallinum

Óli Jákup Jacobsen

Maðurin hevur staðið á palli fyrr. Tað var eingin ivi um tað. Hóast fólkið stóð langt burtur frá pallinum, so framførdi Robert hegnisliga og professionelt – og undirhaldandi.

Styrkin hjá gamla V4 manninum er uttan iva hansara eginleiki at tosa millum sangirnar. Hvør sangur fekk eina 'søgu', sum Robert fortaldi á ein humoristiskan hátt. Eitt nú tá Robert sang kenda sangin hjá Gerry Marsden Ferry cross the Mersey, innleiddi hann við at greiða frá, hvussu hann altíð hugsar um gomlu ferjuna, ið sigldi tvørtur um báðar armarnar í Klaksvíkini, tá hann sang henda sangin.

Í stuttum hevði Robert eina stak góða framførslu, har hann á besta hátt megnaði at undirhalda áskoðarnar.



Summar Festivalur – har hittini hittast



# Einsamallur stórur maður á stórum palli

## Fólkasangari nummar eitt í Føroyum, Hanus Johansen stóð einsamallur á stóra pallinum á Vágsbøi kl. 20.45 fríggjakvøldið.

Sissal Kampmann

Pallurin tóktist óendaliga stórur, og mitt á honum stóð maðurin við guitarinum, sum hvørt mannsbarn í landinum kennir tónleikin hjá. Hanus megnar altíð at undirhalda og fylla rúmið, hvar hann enn er við sínum tónleiki og sínum framferðarhátti, sum tey flestu av okkum hava eina meining um, kenslur fyri og seta í samband við okkurt serstakt.

### Hanus í nýggjum hami

Serliga eru tað løgini frá útgávuni, "Gaman og Álvara", sum eru tey mest populeru, eins og "Fagra blóma" er tað. Men tað, ið var tað besta við konsertini hjá Hanusi í ár var tá hann framførdi lagið "So long Marianne", hjá Leonard Cohen fyri einum nærum fullum Vágsbøi. Hanus kom ótrúliga væl frá síni útgávu av sanginum, og vísti eina aðra síðu av sær sjálvum í hesi framførslu Hetta var ein stór uppliving, sum gav kenslu av onkrum heilt serligum. Eisini vóru løg sum "Vónsvikin" og "Fagra blóma" sjálvsagt væl móttikin av áskoðarunum, sum eiga at vera glað og takksom fyri, at vit eiga ein so ótúligan listarmann sum Hanus í Føroyum.